# Eyðmjúk og lítillátin



*- Eru suðuroyingar hugaðir fyri at hava eitt ríkt og virkið mentunarlív, eiga teir ikki at vera bangnir fyri at koma á gátt í Gallarí Oynni, sigur Astri Luihn, sum í hesum døgum sýnir fram á Tvøroyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**- Tá ið eg kom til Føroya sum ung helt eg meg vera øgiliga vitandi um tað mesta. Men eg fann út av, at eg visti ógvuliga lítið um nógv. Í dag eri eg meiri eyðmjúk, og tað royni eg at fáa fram í míni list, sigur Astri Luihn, listakvinna, sum sýnir fram í Gallarí Oynni á Tvøroyri**

FRAMSÝNING
*Turið Kjølbro*

Næsta mánaðin sýnir listakvinnan Astri Luihn fram í Gallarí Oynni á Tvøroyri. Á framsýningini, sum lat upp hósdagin, eru 30 verk, ið øll eru gjørd seinasta árið.

Astri Luihn hoyrir til tað nýggja rákið í føroyskari myndlist, sum ikki bara vísir landsløg, men eisini setir menniskjans tilveru og hennara spurningar inn í samanhang. Náttúran og lívið í fuglabjørgum eru myndaevni, hon nýtir nógv, men oftast við einum sumbolskum tráð til menniskjans sosialu samveru.

- Íblásturin finni eg alla staðni. Annað hvørt tað er í haganum ella framvið fuglabjørgunum. Eg ímyndi ikki bara tað eg síggi, men eisini mínar kenslur. Bjørgini eitt nú eru ikki bara vøkur og hugtakandi, men tey eru eisini ræðandi. Ljósið er blendandi og ljóðið ógvuliga hart. Bjørgini eru so stór og menniskjan verður so lítil afturímóti. Hetta hugtekur meg nógv, sigur Astri Luihn.

Astri Luihn dámar væl at arbeiða við myndarøðum.

- Ofta geri eg einar tíggju myndir yvir saman myndaevni, har eg royni at fara í dýpdina, ella eg nýti sama slag av tøkni. Síðani fari eg víðari til tað næsta. Tað er frígerandi fyri eitt listafólk at gera røðir av myndum. Hinvegin kann tað eisini vera avmarkandi, greiðir Astri Luihn frá.

Astri Luihn er ikki bangin fyri at ganga nýggjar leiðir í síni list.

- Mær dámar væl at eksperimentera. Eg royni alla tíðina ymisk sløg av máling og svertu, og blandi máling, grafikk og tøkni sum heild saman fyri at finna tað úttrykkið, sum mær dámar. Forðar tilfarið mær í at úttrykka eitthvørt, eg vil, fari eg víðari.

Væl dámar henni at skera í træ ella linolium, tað sum eitur háprent. Hetta verður síðani málað á lørift og prentað.

- Sker tú í træ ella linolium, ber illa til at fjala nakað. Eins og ein blýantstekning. Tað einfalda er mangan truplari enn tað fløkta, sigur Astri Luihn, sum bæði arbeiðir heima og á verkstaði í býnum.

### Eyðmjúk

Astri Luihn er ættað úr Oslo, men hevur búð í Havn seinastu nógvu árini.

- Tá ið eg kom til Føroya sum ung helt eg meg vera øgiliga vitandi um tað mesta. Men eg fann út av, at eg visti ógvuliga lítið - um náttúruna, veður, vind, og hvussu fólk liva saman. Føroyingar hava altíð ferðast og upplivað nógv, í mun til stórbýarfólk, sum í so máta ikki hava verið so nógv úti um seg. Í býunum hava fleiri ættarlið livað á einum stað og upplivað tað sama. Í dag eri eg meiri eyðmjúk enn eg var í yngri árum, og hetta royni eg at fáa fram í mínum verkum, sigur Astri Luihn.

Hon er lítillátin í síni list. Als ikki rópandi. Hyggja vit at eini mynd, hon gjørdi fyri tveimum árum síðani, síggja vit eitt fuglaberg, har ein fuglur situr einsamallur á eini rók, kagandi yvir á hinar. Hvørki litir ella figurar eru hetjukendir.

- Eg tosi eitt friðarligt mál, sum fólk skulu hava á vegginum leingi fyri at koma inní og skilja. List, sum er bráðvøkur, doyr eftir stuttari tíð. Á sama hátt sum fordómar, tú hevur um eitt fólk ella land, fella til jarðar, tá ið tú kemur at kenna viðkomandi, sigur Astri Luihn.

Seinnu árini hevur Astri Luihn tikið nógv lut á framsýningum uttanlands, eitt nú fyri stuttum í New York, har hon sýndi fram saman við øðrum føroyingum. Næsta stóra framsýningin uttanlands, verður á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn eina ferð seint næsta ár. Sjey listafólk úr Føroyum sýna fram saman við øðrum norðurlendingum, og øll fáa tey gott pláss hvør.

- Eftir framsýningina í Suðuroy, fari eg at arbeiða fram ímóti framsýningini næsta ár burturav, sigur hon.

Hetta er fyrstu ferð Astri Luihn hevur einkarframsýning í Suðuroy.

- Eru suðuroyingar hugaðir fyri at hava eitt virkið mentunarlív, eiga teir ikki at vera bangnir fyri at koma á gátt í Gallarí Oynni. Suðuroyingar hava átt eitt tað besta listafólkið í Føroyum nakrantíð, Ruth Smith. Fremmandafólk eru ógvuliga hugtikin av hennara list.

### Fatan og karmar

Tað er so sum so við fatan føroyinga av listafólki. Mangan verður skotið teimum í skógvarnar, at tey grenja so illa. Og nakað er kanska um tað, heldur Astri Luihn.

- Men listafólk grenja hvørki meir ella minni enn onnur fólk. Einasta listafólk vilja er at vísa og selja list. Vit krevja ikki pengar fyri einki at gera.

- Tað er eingin mótsetningur millum sjúkrahús og ellisheim og mentunarlív. Gransking vísir, at fólk støðast væl í einum ríkum mentunarlívi. Har eru vinnumøguleikar, har vilja fólk búgva og har koma ungfólk aftur eftir lokna útbúgving. Er einki mentunarlív, flyta fólk og koma ikki aftur, og eingir pengar eru til tað neyðugasta. Tí er sera skilagott at gera íløgur í mentan, sigur Astri Luihn.

Astri Luihn harmast um, at so lítið av list verður selt nú á døgum.

- Í áttatiárunum varð nógv meiri selt, og tá gingu bankarnir á odda við at stuðla. Á Várframsýningum verður lítið selt. Niðurgongdin byrjaði við kreppuni, men hóast vit meiri og minni eru komin burtur úr henni, eru fólk ikki farin at keypa list aftur í sama mun. Fólk vita ikki av, at tað kostar lítið meiri at keypa upprunalist sum endurprent.

Pengar áttu at verðið settir av á fíggjarlógini til list, heldur Astri Luihn.

- Aðra staðni setir tað almenna eina ávísa prosentupphædd av til list, tá ið eitthvørt nýbyggarí verður gjørt. Í Noregi er tað 2 prosent, og í hinum norðurlondunum liggur tað millum 1 og 2 prosent. Um vit høvdu gjørt á sama hátt í Føroyum, hevði tað munað væl. Ístaðin fyri hava vit sæð í Føroyum, at Mentamálastýrið keypir ein gamlan málning fyri fjórðingsmiljón krónur, sum landið átti ein líknandi av frammanundan. Tá kunnu vit veruliga spyrja okkum sjálvi, um landsstýrismaðurin ikki veit betur, ella um hann ikki hevur ráðgevar, sum kundu sagt honum tað. Tað er í øllum førum synd at brúka so nógvar pengar uppá ein málning, ein replikk, sum tað eitur, ið Mikines hevur málað betur og sum landið frammanundan eigur.

Starvs- og virðislønirnar til listafólk, sum hóast alt eru komnar seinnu árini, eru at fegnast um, heldur Astri Luihn, men tær muna ov lítið.

- Tað er trupult at liva av myndlist í Føroyum, og nógvar útreiðslur eru bundnar av at vera listafólk sum heild. Framsýningar kosta listafólkunum nógv og sjáldan er yvirskot hóast tú selur eitt sindur. Hinvegin er tað ein gleði at vera listafólk, at sleppa at gera tað, tú hevur hug til. Eisini eri eg sera glað fyri at búgva í einum landi sum Føroyum, tá ið vit hugsa um, hvat hendir aðrastaðni. Vit hava ikki orð fyri tí sum hendi til dømis í New York, annað enn at vit kanska skilja betur, hvussu gott vit hava tað her. Listin og listafólk eiga at vera við til at vísa, hvussu gott vit hava tað í Føroyum. Ein leiklutur hjá listafólki er mangan at vísa umstøðurnar í landinum, tey liva í. Í so máta eri tann føroyska myndlistin fantastisk, sigur Astri Luihn at enda í viðtali.



# Sølan av trolaralemmum úr Vági gongur væl




*Her er eitt sett av trolaralemmum komið við flogfari til Saudi-Arabia*

**Í vár opnaði Injector Door Aps upp skrivstovu á bryggjuni í Esbjerg. Endamálið við skrivstovuni er at selja trolaralemmar úr Vági til atljóða marknaðin**

VINNULÍV
*Orð: Terji Nielsen*
*Myndir: Terji Nielsen/Injector Door Aps*

Síðani Helgi Larsen úr Vági miðskeiðis í nítiárunum framleiddi teir fyrstu trolaralemmarnar, meðan hann var lesandi á Skandinavisk Flyteknisk Akademi í Gøteborg, hevur áhugi fyri lemmunum verið støðugt vaksandi. Fyrstu ferð, at lemmarnir vóru royndir í fiskiskapi, var í 1997, tá ið Magnus Heinason royndi við teimum. Úrslitið var nøktandi og nakað væl aftrat, og tískil vóru enn nakrar royndir gjørdar. Í 1998 royndu teir báðir trolararnir, Sæborg og Fiskiklettur, lemmarnar, og aftur hesaferð vóru úrslitini stak góð. Góðu úrslitini gjørdu, at Helgi, saman við bróðrinum Lars, ið er búskaparfrøðingur, valdi at stovna fyritøkuna P/f Injector International í juni 1998. Fyritøkan hevur til húsa í Vági, og í dag starvast í alt 18 fólk hjá Injector Door, harav tey 14 størvini eru í Vági.

### Áhugin vaks út um landoddarnar

Alsamt fleiri fiskiskiparar og reiðarar fingu áhuga fyri trolaralemmunum úr Vági, og eftirspurningurin vaks skjótt. Úr fleiri londum var áhugi fyri lemmunum, og tað gekk ikki long tíð, so royndu bæði norsk, grønlendsk og donsk fiskifør við lemmum úr Vági.

Stóri eftirspurningurin førdi eisini við sær, at teir báðir brøðurnir úr Vági, saman við nøkrum vágbingum í Danmark, settu á stovn danska felagið Injector Door ApS. Endamálið við hesum var, at danska skrivstovan skuldi virka sum søludeild fyri tann altjóða marknaðin. Fyrstu tíðina helt Injector Door ApS til í Svendborg og seinni Horsens, men tann 1. apríl í ár var latið upp í snotiligum skrivstovubygningi á bryggjuni í størstu donsku fiskivinnuhavnini, Esbjerg. Sølustjóri og dagligur leiðari á donsku skrivstovuni er vágbingurin Jan Allan Müller

### Selja til alsamt fleiri lond.

Tað er ein góður danskur summardagur, nú Sosialurin vitjar Injector Door ApS í Fiskerihavnsgade 13B í Esbjerg, men inni á skrivstovuni hava hvørki Jan Allan ella skrivstovukvinnan tíð til at njóta góða veðrið. Telefonin kimar støðugt, og tey bæði hava nógv um at vera. Tó gevur Jan Allan sær stundir til at fortelja eitt sindur um, hvussu tað gongur við søluni av lemmunum úr Vági, og hvørjar ætlanirnar eru fyri framtíðina. Jan Allan greiðir frá, at tað hevur gingið við rúkandi ferð síðsta árið ella so. Í dag hava vágbingarnir selt trolaralemmar til so fjarskotin lond sum USA, Kanada, Korea og Saudi Arabia. Í sambandi við søluna av einum setti av lemmum til Saudi Arabia, nevnir Jan Allan, at keypararnir vóru so spentir upp á lemmarnar, at teir als ikki høvdu stundir til at bíða eftir, at lemmarnir komu fram við skipaflutningi. Tískil blivu lemmarnir sendir við flogfari, og talan var um rættuliga stórar lemmar, og hetta er ógvuliga kostnaðarmikið. Tað kostaði arabisku keyparunum eins nógv í flutningi, sum teir høvdu goldið fyri annan av lemmunum.

### Framleiða lemmar í øllum støddum og til allan fiskiskap

Tað er ógvuliga ymiskt, hvat fyri stødd og tyngd av lemmum, ið Injector Door framleiðir. Framleitt verður eftir tørvi, og Jan Allan greiðir okkum frá, at teir hava framleitt lemmar, sum einans hava verið ein knappan fermetur til støddar og viga umleið 90 kilo til onkran danskan, sum hevur roynt inni á 7 metra dýpi nærheindis donsku vesturstrondini. Hinvegin hava teir eisini framleitt lemmasett, sum hava verið 16,5 fermetrar til støddar og hálvtsjeynda tons til onkran norskan trolara í Ålesund. Ísfiskatrolarin Boðasteinur, sum vágbingar nýligani keyptu frá fuglfirðingum, hevur somuleiðis nýtt lemmar frá Injector Door, tá ið teir hava fiska eftir búrfiksi á 2000 metra dýpd, meðan fuglfirðingar áttu hann.

### Hvat ger lemmarnar so vælumtóktar

Men hvussu ber tað til, at lemmarnir úr Vági eru so vælumtóktir millum fiskiskiparar. Í lýsingarfaldarum frá Injector Door, geva fleiri fiskiskiparar á bæði føroyskum, donskum, norskum og russiskum bátum lemmunumúr Vági sítt besta viðmæli. Teir grundgeva hetta við, at lemmarnir eru nógv teir støðugastu av sínum slagi, og tískil léttari at arbeiða við. Eisini verður nevnt, at oljunýtslan er munandi minni, tá ið lemmarnir frá Injector Doors verða nýttir í mun til lemmarnar frá øðrum framleiðarum.

Somuleiðis siga fleiri av skiparunum í lýsingarfaldaranum, at hesir lemmarnir gerast ikki fastir í botninum.

Ein av skiparunum vísir í faldaranum á, at við teimum vanligu lemmunum nýttu teir millum 90 og 100 prosent av maskinorkuni, tá ið teir togaðu. Við lemmunum úr Vági nýta teir einans 60 prosent, tá ið teir toga, men toga okkurt um tvey sjómíl skjótari. Hetta ger, at teir hava fingið átta tímar meira um døgnið at toga í. At trolaralemmarnir úr Vági gerast alsamt betri umtóktir, eru sølutølini hjá Injector Door besta prógvið um. Sølan í ár 2000 var tríggjar ferðir so stór sum í 1999, og sagt verður, at sølan í ár fer væntandi at verða munandi betur enn undanfarna ár.

### Føroysku lemmarnir eru umhvørvisgóðkendir

Prísurin á lemmunum úr Vági er munandi hægri, enn hvat reiðarar annars gjalda fyri trolaralemmar á nærmarknaðinum. Jan Allan sigur, at lemmarnir hjá Injector Door eru okkurt um 30 - 40 prosent kostnaðarmiklari enn hjá kappingarneytunum. Hetta kann tykjast rættuliga nógv, og tað er tað fyri so vítt eisini. Men lemmarnir hjá vágbingunum eru teir einastu í Europa, sum hava fingið umhvørvisgóðkenning. Hetta merkir, at um t.d. eitt danskt reiðarí keypir eitt sett av lemmum frá Injector Door, so fær reiðaríið 20 prosent av kostnaðarprísinum afturgoldið í stuðuli frá danska statinum. Saman við stóru brennievnisnýtsluni (eini 15 - 30 prosent verða nevnd í faldarunum), ger tað, at føroysku lemmarnir í longdini ikki eru dýrari enn aðrir trolaralemmar.

### Leita eftir royndum skipara til søluarbeiði

Í strembanini eftir at gerast alsamt meiri galdandi á heimsmarknaðinum, leitar leiðslan á Injector Door eftir einum royndum føroyskum fiskiskipara, sum hevur hug og dirvi til at ferðast kring heimin og selja lemmarnar til reiðaríir og skiparar kring knøttin.

Jan Allan Müller sigur, at tað gongur væl hjá teimum at selja, men brúk er fyri einum manni, sum kann fara út til reiðaríir og greiða frá, hvussu lemmarnir eru at arbeiða við á ymiskum fiskileiðum. Tískil er brúk fyri einum skipara, sum hevur roynt eitt sindur av hvørjum.

Somuleiðis hevur Injector Door eisini ætlanir um at lata upp skrivstovur bæði í russiska býnum Murmansk, og í Tromsø í Noreg. Hesar verða tú neyvan mannaðar við føroyskum starvsfólkum.

### Góðar vónir fyri framtíðina

Tað er einki yvir at dylja, at tá man kemur inn á Injector Door Aps í Esbjerg, so merkist, at her er ein fyritøka í menning og við trúgv upp á framtíðina og seg sjálvan. Havandi gongdina undanfarin ár í huga, so er hetta eisini væl skiljandi. Alt bendir á, at lemmarnir, sum Helgi Larsen "uppfann", meðan hann gekk á Skandinavisk Flyteknisk Akademi í Gøteborg, av álvara eru farnir at gera vart við seg á heimsmarknaðinum, og áhugin fyri teimum er støðugt vaksandi.

Tað er ikki sørt, at man sum føroyingur kennir seg ernan, tá ið man takkar fyri seg í Fiskerihavnsgade í Esbjerg, og hugsar um vágbingarnar, sum veruliga eru komnir við einari produkti, sum ger seg galdandi á heimsmarknaðinum.



*Her sæst trolari við Injector lemmum kom fullastaður til lands*